# Sól, fjøra og kamping

**Tað eru ikki mong verulig kampingpláss í Føroyum. Eitt finst í øllum førum á Selatrað, og tað hava fleiri fólk longu fingið eyguni upp fyri.**
**- Hóast vit ikki hava lýst nakað serligt, hava longu fólk úr fleiri londum vitjað her, sigur Jákup Weihe, umsjónarmaður á økinum**



*- Vit vóru heldur seint at lýsa við kampingplássinum. Men fólk hava kortini funnið leiðina higar, sigur Jákup Weihe, umsjónarmaður*

*Mynd: Høgni Thomsen*

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Selatrað:** Tað er týsdagur og veðrið er av tí besta. Turrveður er og sólin kagar fram við millumbilum.

Á kampingplássinum her á havnarlagnum er lítið virksemi beint nú og eingin fremmandur ella føroyskur kampingbilur at síggja.

- Tað var óheppið, at tit koma beint nú. Júst í dag er eingin bilur, men her hava longu verið fólk úr fleiri londum, sigur Jákup.

Við í ferðalagnum er borgarstjórin í Sjóvar kommunu, Malena Thomsen, sum nú fær møguleikan at síggja, hvussu hetta plássið á Selatrað er skipað til tess at taka ímóti ferðafólki.

- Selatrað er sera vælegnað til slíkt virksemi. Bygdin er sera hugnalig og hevur haraftrat sera góðan sólargang, slær hon fast.

Meðan vit tosa kemur ein húsbilur koyrandi móti bygdini. Jákup fylgir væl við honum og byrjar so smátt at fyrireika seg at taka ímóti honum.

Men gakk, hann koyrdi gjøgnum bygdina, vendi og helt so leiðina suðureftir aftur.

- Nei, eg má skunda undir at fáa teir at seta skeltið upp, soleiðis at ferðafólkini fáa eyga á okkara kampingpláss, sigur hann avgjørdur.

## Bíleggja í góðari tíð

Á kampingplássinum á Selatrað er pláss fyri eini 25 bilum og helst enn fleiri.

Uppgávan hjá Jákupi er í roynd og veru at umsita hetta nýggjasta kampingplássið, sum lat upp fyrst í mai mánaði.

> *Vit vita jú eisini tað, at útlendingar planleggja ferðirnar í góðari tíð – týskarar faktiskt eitt heilt ár frammanundan*

- Eg eri eitt sindur harmur um, at vit komu so seint í gongd í ár. Næsta ár verður betri, sigur Jákup.

Tey hava higartil gjørt eitt sindur við at kunna um hetta einasta veruliga kampingplássið í landinum. Tað er millum annað nevnt á heimasíðuni hjá Sjóvar kommunu, eins og ein grein hevur staðið á heimasíðuni hjá camping.fo.

Henda týsdagin vit vóru og vitjaðu á Selatrað, var eingin bilur á plássinum, men Jákup letur kortini ikki illa at undirtøkuni.

- Lýsingarnar komu heldur seint í gongd. Vit komu tí ikki við í ta stóru lýsingarkampanjuna fyri ferðing í Føroyum.

- Og so vita vit jú eisini tað, at útlendingar planleggja ferðirnar í góðari tíð – týskarar faktiskt eitt heilt ár frammanundan!, sigur Jákup.

> *Selatrað er sera vælegnað til slíkt virksemi. Bygdin er sera hugnalig og hevur haraftrat sera góðan sólargang*

## Spenna seg út

Hóast hesar umstøður hava fólk úr rættiliga nógvum londum longu gist á Selatrað. Her hava verið bæði týskarar, belgiarar og íslendingar - eisini ein hópur av føroyingum.

Útlendingarnir koma í flestu førum í teimum sonevndu húsbilunum, meðan føroyingarnir í størstan mun koma higar við kampingvognum sínum.

Júst, hvussu og hví tey eru komin higar, veit Jákup ikki at siga. Men, sum hann sigur: - Tað man vera mestsum av tilvild!

Onkur teirra hevði spurt seg fyri um møguleikarnar fyri at gista á einum kampingplássi í Føroyum, meðan onkur annar bara var farin ein koyritúr og var soleiðis endaður á hesum vakra staðnum burtur frá alfaravegi.

Bæði Malena og Jákup eru sannførd um, at hetta kampingplássið er komið fyri at verða.

Hetta summarið verður at meta sum eitt royndarár. Men komandi ár er ætlanin at spenna seg rættiliga út!

## Hava alt

Tá føroyingar koyra uttanlands, verður javnan vitjað inn á tey mongu campingplássini á vegnum. Hvat hevur hetta kampingplássið á Selatrað at bjóða teimum vitjandi?

- Vit hava snøgt sagt alt!, slær Jákup fast.

Her finst bæði streymveiting, vatn og møguleika at tøma bæði spillivatn og rottanga á vognunum. Umframt hetta finst ein vognur við toilettum og brúsu.

- Ja, hann sær kanska ikki so stórur út við fyrsta eygnabrá, men hann er sera rúmligur, tá ein fyrst kemur inn í hann, greiðir hann frá.

Umframt hetta er møguleiki at leiga eina smáttu, sum somuleiðis liggur her á kampingplássinum.

